# Sunnir dagstovnar í Klaksvík

Dagstovnarnir og dagrøktin í Klaksvík varpa nú ljós á sunnan kost. Í hesum sambandi eru stig tikin til, at børnini í ansingarskipanini fáa frukt dagliga. Børnini í dagrøktarskipanini fáa frukt, tá tey eru í spælistovuni. Hanna Thøgersen, samskipari fyri ansingarskipanini sigur við heimasíðuna hjá Klaksvík, at dagstovnarnir við hesum átaki vilja vera við til at ganga á odda fyri at varpa ljós á sunnan lívsstíl og tryggja, at børnini verða víst á tann sunna hugburðin. Í samband við at Klaksvíkar Kommuna fyllir 100 ár, fara dagstovnarnir harumframt at skipa fyri ymsum forvitnisligum tiltøkum í ár.



## Grønlandstíðindi

Kári við Stein

# Roktúrur hjá Arctic Viking

**Vit hava frætt seinastu tíðindi frá Kára við Stein, okkara manni í Grønlandi**



*Artic Viking*

Hann greiður frá:

### 17. januar

Í dag er stilli og – 14 stig. Akamalik er inni í Nuuk. Hann landar og skiftir fólk. Frætt er at Markus manglar lítið í fulla last. Teir skulla til Íslands at landa og bunkra tungolju. Frá Atlantic Enterprice er frætt, at teir mangla um 70 tons í last. Teir mistu allan reiðskapin og fóru so inn í ísin at rigga eitt trol til. Teir koyrdu so trolið út aftur. Tað var ófantaligt veður og lítið at fáa. Dagin eftir varð betri veður. So riggaðu teir dreggið til, og tað lukkadist at fáa alt inn aftur, sum teir høvdu mist. Hetta var ein góður fongur.

Gongur alt, sum tað skal, skulla teir landa St Anthony her sunnudagin, og fer hann so til Harbour Grace at skifta fólk. Ocean Tiger hevur verið inni í Íslandi herfyri og landa rækjur úr Eysturgrønlandi. Sum skilst høvdu teir troffið við nakað av rækjum á Billini, sum teir kalla, tá tað var komandi at fyri á ísi, sum nógv er av. Tað sigst, at tað er óvanligt fyri hesa tíðina.

### 21. januar

Í dag eru -6 stig og stilli. Lómur kom inn at landa í morgun. Teir hava gott 90 tons inni. Teir skulla sigla í morgin árla. Rækjuvirkið varð stongt 19. desember. Tað opnaði aftur fyri avreiðingum 2. januar. Nú hava teir so funnið útav, at teir skulla steingja virkið frá 27. januar til 4. februar, tí teir skulla skifta valsar á pilkimaskinuni. Tískil fær rækjuflotin aftur eina eyka feriu.

Polar Natarnaq var inni í Aasiaat og landaði. Teir fóru út aftur leygardagin nýggjan túr.

### 22. januar

Í dag eru – 7 stig og vindur av vestri. Qaqatsiaaq kom inn at landa í morgun. Teir hava knappa fulla last inni. Søgur siga, at rækjufiskiskapurin pr. dag er minkaður í tonsatali hjá trolarunum, og er hetta galdandi fyri øll fiskimið.

### 23. januar

Í dag er vindur av vestri, kavaælingur og – 8 stig. Qaqqatsiaq var liðugur at landa í nátt kl 0200, og teir loystu nýggjan túr kl 0800 í morgun. Regina C er inni í Nuuk og landar. Teir hava gott 200 tons inni. Teir skulla skifta fólk nú eisini. Akamalik kom inn til Nuuk eftir nýggjum trolgreiðum. Natarnaq kemur inn til Nuuk í morgin at landa. Nú verður sagt, at trolararnir liggja her útfyri í Holsteinsborgdýpinum og royna.

Toskabátarnir har suðuri havi so at siga ikki verið úti fyri veður. Ein línubátur hevði sett gott 30 stampar inni á onkrum fjørði. Teir fingu eini 800 pund, bara skrambul av fiski. Tað var so at siga eingin toskur. Tað var mest uvaq, eitt slag av toski, og onnur fiskasløg.

### 27. januar

Mesti kavi í nærum 40 ár

Í dag eru -15 stig og lot av norði. Lómur kom inn at landa í morgun. Teir hava gott 50 tons inni. Tað hevur ikki verið roynandi fyri ísi hjá teimum.

Tad er ein øgiligur kavi, sum vit hava fingið her. Eg minnist ikki, at vit hava haft so nógvan kavi, síðani eg kom her yvir fyrstu ferð í 1970. Tað hevur eisini komið kavi so at siga hvønn dag í langa tíð. Eg veit ikki, hvussu nógvar kubikkmetrar av kava, sum eg havi varpað út úr mínum garði, men tað eru heilt nógv. Eg havi keypt mær eina kavamaskinu, og hon sproytar kavan langa veg. Skuldi tað havt verið gjørt við hond, so vóru armanir blivnir langir av at kasta kavan.

### 28. januar

Í dag er – 18 stig og eitt lítið lot av eystri. Polar Nagtoralik landar í Nuuk í dag og Polar Amaroq kom inn higar at landa í morgun. Har var alt fult hjá teimum.

### 29. januar

Í dag eru – 17 stig. Polar Amaroq var liðugt landaður og sigliklárur um 0300 tíðina. Teir máttu tó bíða eftir fólki, sum skuldi koma vid flogfari um døgurðatíð. Lómur loysti nýggjan túr. Sum skilst, skulla teir landa í Pamiut nakrar túrar. Ocean Tiger kom vesturum í gjár. Har var so at siga ikki rækja at fáa í Eysturgrønlandi og ísviðurskiftini vóru stak vánalig.

### 30. januar

Roktúrur hjá føroyskum skipi

Í dag eru – 17 stig og stilli. Artic Viking kom til Reykjavík í morgun at landa frá Flemish Cap. Teir hava haft ein óføran túr hesaferð. Sum skilst hava teir bert fiskað í 18 dagar. Óført.

Í morgin 31. januar skal Tasermiut landa í Nuuk.